# Nordin heldur fast í Kondittarínum

**Framvegis er óvist, nær matstaðið, har Kondittaríið helt til, letur upp aftur. Nýggi eigarin hevur ongar ætlanir um sleppa gamla Kondittarínum, og ætlar at halda fast við hugnaliga dámin á nýggja matstaðnum**

KONDITTARÍIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Nýggi eigarin av kondittaríinum, Nordin Manai, hevur ongar ætlanir um sleppa gamla Kondittarínum-heldur tvørturímóti. Teska hevur verið í krókunum um, at hugnaliga matstaðið nú endaliga fór í søguna, tí nýggi eigarin ætlaði at nýta staðið til annað virksemi. Hesum vísir Nordin Manai aftur, og sigur, at hann ætlar, at húsið skal nýtast sum kondittarí.

Nýggi eigarin er í løtuni í holt við at gera nakrar umbyggingar, ið fara at hava við sær, at gamla Kondittaríið fer at fáa nýggjan ham. Í løtuni verður arbeitt við at mála, skifta borð og møblar út, so kondittaríð verður nútíðargjørt.


*Hóast Kondittaríið verður nútíðargjørt, so hevur nýggi eigarin, Nordin Manai, ongar ætlanir um at sleppa gamla Kondittarínum, og sigur seg ætla at halda fast við hugnaliga dámin á matstaðnum*
*Savnsmynd*

### Morgunmatur verður til keyps

Nordin Manai ætlar at hava morgunmat – eins og á gamla Kondittarínum til teir mongu trúføstu gestirnar. Eftir døgurða verður onnur matskrá, og matstaðið fer at minna um ein dessertcafe.

Nýggi eigarin hevur ongar ætlanir um at søkja um skeinkiloyvi, og ei heldur hevur hann funnið nakað nýtt navn til staðið. Hann nevnir, at bløðunum varð skrivað, at staðið skuldi at eita »Det Glade Hjørne«, men tað er bara eitt uppskot av mongum.

Nordin Manai dugir ikki at siga nær nýggja staðið fer at lata upp aftur, tí framvegis er nógv papírarbeiðið, ið skal fáast frá hondini.

Honum vantar framvegis loyvi frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Brunaumsjónini og Býráðnum, og tað kann taka drúgva tíð, so ilt er at meta um, nær eyðkenda havnarmyndin letur upp aftur.

### Havnarfólk fegnast

Spurdur, um hann hevur fingið nakað afturljóð frá havnarborgarum, eftir hann fekk leigusáttmála í lag, svarar Nordin, at fólk eru sum heild sera fegin um, at kondittariíð fer at lata upp aftur.

Hann sigur seg vænta, at gomlu og trúføstu gestirnar fara at venda aftur til nýggja matstaðið, og hann fer at gera alt fyri at hildið verður fast við hugnaliga dámin á gamla Kondittarínum á nýggja matstaðnum.

# Tórshavnar Kamarkóri vantar kórleiðara

Í Føroyum er kórvirksemi so stórt, at torført er nú at fáa kórleiðarar at stjórna øllum sangkórum. Tórshavnar Kamarkór er nú uttan kórleiðara, og heitir tí á hann ella hana, ið kann stjórna kórinum, og at venda sær til kórið

Tórshavnar Kamarkór er í einari serstøðu í løtuni. Kórið ætlar í næstum at byrja sangvenjingarnar – fram ímóti einum túri til Týsklands komandi summar – men kórinum hevur ikki eydnast at funnið ein kórleiðara.

Seinasta ár stjórnaði Leif Hansen kórinum, men hann fer nú aftur til Danmarkar í lestrarørindum. Kórlimirnir fegnast um, at Leif nemur sær enn meira kunnleika til tónleikin. Men tað er tó við einum veti av sorgblídni, tí Leif hevur ikki bara verið ein dugnaligur kórleiðari. Hann hevur eisini verið bæði fryntligur og hugagóður, og tað meta flestu kórsangarar høgt.

Kórið hevur verið í samband við nøkur kórleiðarevni, men tað hevur víst seg at vera í so trupult at fáa nakran at játta seg til hetta spennandi starv. Orsøkin er helst, at kór- og tónleikavirksemið er so mikið stórt her á klettunum, at fólk aftra seg við at taka meira upp á seg, enn tey frammanundan hava.

Sangararnir í kórinum ivast tó ikki í, at tað onkunstaðni – ella helst fleiri staðir – kring landið situr ein – ella fleiri – kórleiðarar, ið kundu hugsa sær at stjórna og arbeitt saman við einum kóri sum Tórshavnar Kamarkór.

Kórið heitir tí, at hana ella hann, ið møguliga ivast í, um tey megna ella hava stundir til at leiða eitt blandað kór við 20-25 dugnaligum og fyrikomandi sangarum, um at seta seg í samband við nevndina í Tórshavnar Kamarkóri, so tey í felag kunnu finna útav, um tey eru tey røttu fyri hvønn annan.

Til ber at koma í samband við nevndina á tlf. 311595, Herborg Nyholm Debess, og á tlf. 317376 Barbara á Tjaldrafløtti.



Stóra tøkk fyri sýnda samkenslu,
tá mín elskaði maður

**gvan la n**
Fuglafjørður

so brádliga varð tikin heim.

Eg vil hjartaliga takka tykkum,
sum sótu hjá honum til tað seinasta.

Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar
og til tykkum øll fyri tykkara hjálpsemi.
Tøkk til lærarar og næmingar í Fuglafjarðar
skúla fyri vakra sálmin »Mín Jesus lat
mítt hjarta fá«, sum var so kensluborin.
Eisini ein tøkk til Hannis, Heðin og
Frits fyri teirra vakra sang.

Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.

Tøkk fyri vakrar blómur og kransar
og fyri gávur til Reyða Kross.

Stóra tøkk fyri vøkur minningarorð.

*Vegna tey avvarandi*
**lu a**



# Bretska stjórnin vil læra av føroyskari fiskivinnu

**Tveir embætismenn frá »The Prime Minister´s Strategy Unit« úr bretska forsætismálaráðnum í Downing Street nr. 10 eru komnir til Føroya at fáa íblástur og lærdóm frá fiskivinnuni her á landi. Kunningarferðin er liður í arbeiðinum at gera álit um menningina í bretskari fiskivinnu**

VITJAN ÚR DOWNING STREET
*Heini í Skorini*


*Bretska stjórnin við Tony Blair á odda metir nú føroysku fiskivinnuna vera so spennandi, at teir hava sent tveir av høvuðsembætismonnum sínum úr Downing Street nr. 10 til Føroya á kunningarferð um føroysku fiskivinnuna. Teir báðir bretarnir eru umboð fyri serbólkin, "The Prime Minister´s Strategy Unit", sum skal orða eitt álit um bretska fiskivinnu í framtíðini*

Fleiri føroyingar, sum á ein ella annan hátt eru knýttir at føroysku fiskivinnuni, hava fingið ella fáa nú fína vitjan. Tveir embætismenn fyri bretsku stjórnina eru nevniliga komnir til Føroya á eini kunningarferð um føroysku fiskivinnuna, og lendu teir týskvøldið í Vágunum.

### Ráðgevar Tony Blairs

Bretski forsetisráðharrin, Tony Blair, sum í hesum døgum veruliga er í politiskum ódnarveðri orsakað av Irak stríðnum, setti í juni 2002 ein serbólk, »The Prime Minister´s Strategy Unit«, sum er ein savnað og samansett eind av fleiri minni bólkum. The »PM´s Strategy Unit« er fremsti ráðgevingarbólkurin hjá sjálvum Tony Blair, og arbeiða ráðgevararnir við langsiktaðum strategiskum ætlanum og møguleikum at menna Bretland á fiskivinnuliga økinum. Umframt hetta verður eisini granskað í politiskum analysum og nýggjum menningarmøguleikum, og samskifta embætismenninir við sjálvan forsætisráðharran gjøgnum stjórnarráðið (Cabinet Secretary).

Í vitjanini til Føroya hevur annar teirra arbeitt í bretska fiskimálaráðnum og hevur fingið til uppgávu at vera við í hesi verkætlan, meðan hin fast arbeiðir í serbólkinum hjá Tony Blair.


*Anfinn Kallsberg, løgmaður, er eftir ætlan vertur í fyrstu formellu vitjanini hjá embætismonnunum frá bretsku stjórnini*

### Vilja læra av føroyingum

Í løtuni arbeiðir hesin granskingardepil við møguleikum at menna, modernisera og rationalisera ein framtíðar bygna í bretskari fiskivinnu, sum ikki gongur væl í løtuni.

Sum liður í hesi stóru verkætlan ynskja bretarnir serliga at hyggja at fiskivinnutjóðum burturav, og tað er í hesum høpi, at Føroyar gerst áhugavert fyri bretsku stjórnina. Hetta er bakgrundin fyri og orsøkin til, at føroyski sendiharrin í Onglandi fyri stuttum fekk fyrispurning frá bretsku stjórnini, um føroyska sendistovan kundi hjálpa til at samskipa eina kunningarferð til Føroya. Hetta varð fingið í lag, og nú eru bretsku embætismenninir lendir við tí fyri eyga at fáa íblástur úr Føroyum til menning og framburð í bretsku fiskivinnuni.

Ítøkiliga ynski hjá bretsku stjórnini er at fáa orða eina langsiktaða, strukturpolitiska ætlan við endamálinum at skapa eina burðardygga vinnu, sum tekur støði í samfeløgum, sum liva av og eru tengd at sosialu og búskaparligu viðurskiftunum í fiskivinnuni. Fasta deildin undir enska forsætismálaráðnum skal við hesum gera eitt álit um framtíðarviðurskiftini í fiskivinnuni, og ein av endamálsorðingunum hjá »The PM´s Strategy Unit« er við støði í gransking og vitan at kunna hugsa um, skapa og broyta framtíðina fyri Bretland.

### Nógv á skránni

Serfrøðingarnir úr Downing Street hava gjørt eina skrá fyri føroyavitjanina. Umframt stovnar og fyritøkur fáa 18 føroyingar vitjan av bretum, sum á ein ella annan hátt eru tengdir at fiskivinnu í Føroyum.

Millum teirra, sum fáa vitjan, eru Anfinn Kallsberg, løgmaður, Jacob Vestergaard, landssýrismaður í fiskivinnumálum, Henrik Old, formaður í vinnunevndini, Óli Jakobsen, formaðurin í fiskimannafelagnum, Jørgen Niclassen, fyrrverandi fiskimálaráðharri og Herman Oskarsson, búskaparfrøðingur á Hagstovu Føroya.

### Frá teori til praksis

Vitjan teirra fevnir um tveir dagar, og Mark Halden, sum er annar av teimum báðum, sum koma til Føroya, ynskir serliga at fáa fiskivinnuliga lívið í praksis undir sjóneyku.

- Okkara høvuðsmál er at kanna søguligu bakgrundina og menningina í føroyskari fiskivinnu, umframt at vit við einum teoretiskum grundarlagið vilja síggja, hvussu skipanin og teknisku viðurskiftini virka í praksis í Føroyum.

Mark Halden vísir á, at talan í ein mun verður um teknisk viðurskiftin umframt administratión og management. Sambært bretska embætismanninum ynskja teir at nýta so nógva tíð sum gjørligt við persónum, sum hava verið við at orða og sett í gildi føroyskan fiskivinnupolitikk. Í hesum høpi nevnir Mark Halden m.a. fiskidagaskipanina sum eitt áhugavert fyribrigdi, sum vert er at hyggja nærri at, og eisini verður eitt øki at kanna, hvussu føroyska fiskivinnan hevur megnað broytingarnar gjøgnum rationalisering og integratión á heimsmarknaðinum.

Áhugin hjá bretsku serfrøðingunum er sostatt at kanna umsitingarligu viðurskifti føroyinga, samstarvi millum ymsu vinnurnar og sektorarnir í sjálvari fiskivinnuni, granskingarviðurskifti o.s.fr.

Umframt at arbeiða í stjórnini hjá Tony Blair, hava teir báðir eisini tilknýtið til fiskivinnuviðurskifti í ES, og tískil er talan ikki um hvønn sum helst, men um eina serliga vitjan, sum vónandi kann vera við til at menna samstarv okkara við Bretland og útheimin annars.